# dningar ller

læra, tá ið hann var 15 ár.

Tað kann skoytast uppí her, at Niels Petur eisini er sera musikalskur, hevur vakra sangrødd og spældi klaver.

Tá ið lærutíðin var liðug kom Niels Petur fyrst at arbeiða á Vanførehjemmet sum skraddari. Síðan fór hann til Illum í tvey ár, so til Alfred Alm, skraddarameistara í Bredgade, síðan til Julius Kopp í eitt ár. Hann fór so aftur til Alm, har hann var í 30 ár.

Tað vóru einir 6-7 skræddarar, sum arbeiddu her. Millum teir, sum Niels Petur seymaði fyri, vóru fleiri kendir vinnulívsmenn. Ein av hesum var Mærsk Mckinney Møller. Niels Petur plagdi at seyma jakkarnar til hansara klædningar. Tað vóru aðrir, sum seymaðu buksurnar. Einaferð vildi Møller heilsa uppá mannin, sum seymaði hansara jakkar, og Niels Petur fekk eina fløsku av whisky frá honum.

Tá ið Møller seinast í 90-unum var í Føroyum í samband við ætlanina hjá Mærsk fyritøkuni at leggja oljuhavn á Tvøroyri, kundi borgmeistarin Páll Vang greiða frá, at tað var beiggi hansara, sum seymaði hansara jakkar.

Páll Vang gjørdist lamin fyri 9 árum síðani. Tá ið Mærsk McKinney frætti hetta, sendi hann blómutyssi og bræv til Páll og bað hann um ikki at falla í fátt. Seinni var takkarbræv sent til Mærsk McKinney Møller. Hann takkaði fyri brævið og skrivaði, at hann framvegis brúkti fleiri av jakkunum hjá Niels Petur.

Mærsk Mckinney átti ein beiggja – Hans – ið bert 20 ára gamal doyði av polio.

Mannagongdin var annars tann, at tað var meistarin, sum tók mát av klædningunum, og hesum skuldu sveinarnir seyma eftir. Tað tók umleið eina viku at seyma ein jakka.

Annars heldur Niels Petur, at hann hevur verið bíligur fyri føroyska samfelagið. Hann hevur ikki fingið eina krónu í studningi.

## Elkær Hansen hjálpti við íbúð

Niels Petur giftist í 1959 við Idu. Tað, sum so ráddi um, var at finna eina íbúð, sum var egnað til rørslutarnað. Hana funnu tey í Alléen í Kastrup. Tað var annars ikki lætt at finna eina slíka íbúð. Men tað var so heppið, at her var ein borgmeistari, sum kallaðist Elkær Hansen. Hann var beiggi ríkisumboðsmannin við sama eftirnavni í Føroyum. Kanska hevur hann havt samhuga við hendan ídna føroyingin. Íbúð fekk hann í hvussu er. Hann býr bert eitt stopp við Metro frá lufthavnini, so hetta er sera høgligt, tá ið familja úr Føroyum kemur fram við. Hetta hevur eisini verið eitt heim, har øll hansara í Føroyum hava kent seg vælkomin.

Tá ið Niels Petur var 60 ára gamal, mátti hann lata seg pensjonera vegna slit í albogum og akslum. Hann hevur tískil havt eitt nærum fult arbeiðslív, hóast sítt likamliga brek.

Tey fingu fýra børn. Elstur var Palli, maskinistur, sum er deyður fyri nøkrum árum síðani. Tey fingu eisini tríggar gentur, Linda, tannrøktari, Berit, heimahjálpari og



Frá vinstru Linda, dóttir hennara Maria og Berit, sum býr heima hjá pápanum



Hjemmet for Vanføre, heimið hjá Niels Petur frá 8 ára aldri

Annette, sjúkrasystir. Abbabørnini eru trý í tali.

Niels Petur er væl fyri. Hann fær tíðina at ganga við telduni. Hann skrivar eisini hópin av teldubrøvum. Hann hevur eitt lætt lyndi. Hóast hann hevur búð so stóran part av lívinum í Danmark, kann hetta ikki hoyrast á honum. Hann tosar og tekur dýran til sum ein rættur suðringur! Berit, dóttir hansara, býr heima hjá honum. Ida doyði fyri nøkrum árum síðani.

Niels Petur er eisini sera positivur. Hann hevur bert alt gott at bera Vanførehjemmet, sínum arbeiðsplássum, Tårny kommunu og danska statinum, sum hava verið við til at geva honum og familjuni eitt gott lív.

## Palli misti tvær konur

Pápin, Palli, giftist aftur, nøkur ár eftir at Anna var deyð, við Honnu úr Fámjin. Tey fingu sonin Páll. Hann gjørdist landsstýrismaður og seinni býráðsformaður á Tvøroyri.

Páll er giftur við Elini úr Gøtu, og eiga tey børnini: Barbaru, løgfrøðingur, Hanna, magistari, Rakul, sjúkrasystir og Elisa, lesandi.

Her kann verða skoytt uppí, at Dánjal gjørdist lærari í Fuglafirði, har hann er limur í býráðnum. Í løtuni arbeiðir hann sum lærari í Funningsfirði. Dánjal er giftur við Katrinu úr Klaksvík og eiga tey børnini: Joan, skrivustovufólk, Palli, sølumaður, Árni, lærari

Anna, sum er økonoma, býr í Froðba og er gift við Regin úr Øravík. Børnini er Marita, stjóri í Vinnuhúsinum, Bina, sosialráðgevi og Jóannes, sum er timburmaður.

Tá ið Palli giftust við Hannu, kundi Dánjal 7 ára gamal koma aftur í barnaheimið á Sevmýri at vera. Hanna var eitt gott fólk, sum gjørdi húsið til eitt gott og trygt heim. Hon tók sær væl av Dánjal, Páll og Palla. Tá ið Niels Petur var heima á summarferiu, tók hon sær fyrimyndarliga væl av honum. Tað var ein dyggur



Páll Vang, beiggi Niels Petur, saman við Mærsk McKinney Møller, tá ið tað var talan um at gera Tvøroyri til oljuhavn

smeitur og stór sorg, tá ið Hanna doyði í 1957, bert 37 ára gomul.

Ein maður spurdi Palla, hvussu hann orkaði at liva, nú hann hevði mist tvær konur og upplivað so nógva sorg? Hann svaraði: "Við at arbeiða hart frá morgun til myrkurs, og tá ið tú kemur heim, sovnar tú, so sorgin kann ikki taka kvørkratak á tær."

Palli giftist triðju ferð við Svenny úr Froðba. Tey fingu sonin Jaspur, sum beint nú er komin á ting fyri sambandsflokkin í samband við umskipanina av landsstýrinum. Tá var Páll framvegis heima, so hon gjørdist sum ein mamma eisini fyri Páll og ein góður stuðul fyri Dánjal, ið tá var farin til Danmarkar at lesa til lærara. Svenny hevði eitt gott samband við Niels Petur og familju hansara, somuleiðis við systkini hjá Niels Peturi. Svenny doyði fyri nøkrum árum síðani 84 ára gomul.

Jaspur er politistur og giftur við Sólfríð úr Froðba, hon arbeiðir í Frítíðarskúlanum. Tey eiga børnini Annika, lærarlesandi, Maria, gongur á studentaskúla. Øll fimm systkini úr teimum trimum hjúnaløgunum hjá Palla eru væl og hava altíð stuðlað hvørjum øðrum.

## Palli sjálvur fyri vanlagnu

Men nú var tað Palli sjálvur, sum var fyri vanlagnu. Ein dagin í 1965 hann var farin burtur í haga datt hann oman, og sást ikki aftur. Palli varð kallaður Rok-Palli, og tað liggur í hesum, at hann hevur verið ein sera raskur maður. Enn einaferð vóru børnini hjá Palla fyri svárum missi og ikki minst var tað svárt fyri Svenny og lítla Jaspur. Palli gjørdist bert 57 ár.

Tað kann sigast, at tað hevur verið ríkiligt av mótburði í hesi familju, men við góðum samanhaldi og hjálp frá familjunum í Froðba, Sandvík, Fámjin og øðrum góðum fólkum við, eru tey væl undansloppin.

Tað var hugnaligt at fáa hetta prát við Niels Petur. Hann er eitt gott dømi um, at er hugburðurin positivur ber saktans til at fáa eitt gott lív, hóast alt ikki gongur eftir vild.